Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 31. oktober 2023

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál

Elisabeth Holm, Samskipari í Góðskueindini á Fróðskaparsetri Føroya, skrivaði uppskot til hoyringarsvar, sum hetta skrivið er grundað á. Hoyringarsvarið hevur verið til ummælis hjá ymiskum viðkomandi starvsfólkum á Setrinum, sum taka undir við svarinum.

Fróðskaparsetur Føroya takkar aðalráðnum fyri høvi at koma við hoyringarsvari til uppskotið til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál. Á Setrinum fegnast vit um, at fakøkið føroyskt sum annaðmál (stytt FSA) verður raðfest, og at aðalráðið hevur sett sær sum mál at skipa ein fakligan, námsfrøðiligan og løgfrøðiligan karm fyri økið. At uppskotssetarar vilja tryggja samstarv við kommunurnar, og at lógarkarmurin skal vera smidligur og taka atlit til tann staðbundna tørvin, er skilligt.

Tá tað er sagt, so eru fleiri viðurskifti í sambandi við lógaruppskotið, sum antin eru ógreið ella ikki eru við í lógaruppskotinum og hartil hoyrandi viðmerkingum til lógartekstin. Hesi viðurskifti verða í stuttum umrødd niðanfyri, skipað undir tematiskar yvirskriftir og tilhoyrandi spurningar. Viðmerkingarnar eru býttar upp í (1) *Yvirskipaðar viðmerkingar og spurningar* og (2) *Viðmerkingar til ávísar greinar í lógaruppskotinum*.

1. Yvirskipaðar viðmerkingar og spurningar

Leiklutur Setursins

Sjálvt lógaruppskotið áleggur ikki Fróðskaparsetri Føroya nakran leiklut, uppgávur ella skyldur í sambandi við ætlaða málskúlan. Landsstýrismaðurin fær tó í lógaruppskotinum heimildir til at áseta nærri reglur á fleiri økjum, og tí er ikki greitt, um Fróðskaparsetur

Føroya fær onkran leiklut sambært kunngerð. Viðmerkjast skal, at Fróðskaparsetur Føroya sjálvt hevur tilmæli um, at Setrið fær ein aktivan leiklut í sambandi við útbúgving og førleikamenning av lærarum, sum skulu undirvísa á málskúlanum; sí viðmerkingarnar til § 7, stk. 2 og 3 niðanfyri.

Málskúlin og kobling til gransking

Lógaruppskotið áleggur ikki málskúlanum at knýta undirvísingar- og skeiðsvirksemi stovnsins til gransking í nýggja fakøkinum føroyskt sum annaðmál. Tað mæla vit á Setrinum til verður gjørt fyri at tryggja áhaldandi samvirkan millum útbúgvingarpolitikk, praksis og gransking. Viðkomandi spurningar at hava í huga hesum viðvíkjandi eru m.a.:

- Hvussu hugsa uppskotssetarar, at fakliga og námsfrøðiliga støðið á teimum útbúgvingum, skeiðum og øðrum virksemi, sum málskúlin bjóðar, verður dygdarment, eftirmett og dagført sambært nýggjari gransking á annaðmálsøkinum?
- Hvussu verða fakligu førleikar læraranna tryggjaðir (sí viðmerking niðanfyri)?
- Hvør er visjónin fyri samstarvi millum undirvísarar skúlans, annaðmálsmáltakarar (tey ið læra føroyskt) og granskarar? Hvør er visjón málskúlans fyri móttøku, inklusjón og stuðuli av lesandi/máltakarum í einum lívlong læringssjónarhorni?

Málskúlin sum partur av útbúgvingarskipan landsins

Lógaruppskotið staðfestir, at málskúlin er ein sjálvstøðugur stovnur, t.e. ein nýggjur útbúgvingarstovnur. Men, uppskotið nágreinar ikki, hvar í útbúgvingarskipan landsins hesin nýggi stovnur er plaseraður. Er stovnurin lýstur í komandi førleikakarminum (NQF)? Og, hvar í yvirskipaða útbúgvingarpolitikki landsins figurerar hesin skúli? Er málskúlin partur av ætlaðari heildarætlan (strategi) fyri FSA-økið? Hvat er tilknýtið málskúlans til aðrar útbúgvingar, útbúgvingarstovnar og møguligar aðrar stovnar (t.d. arbeiðspláss)? Av tí at málskúlin fevnir um børn eldri enn 12 ár, verður í uppskotinum komið inn á undirvísing og ábyrgdarøki, sum bæði fólkaskúlin og miðnámsskúlar varða av. Markamót og samstarv millum hesi øki eru ógreið í lógaruppskotinum. Harafturat er í lógaruppskotinum ikki nágreinað, um útbúgvingartilboð skúlans eru førleikagevandi. Hvørja trygd veitir málskúlin máltakarum í mun til víðari útbúgving í føroyska

undirvísingarverkinum, t.d. atgongd til miðnám ella hægri lestur? Harumframt, eigur eitt uppskot sum hetta ikki at nágreina, um útbúgvingar á málskúlanum fyri føroyskt sum annaðmál eru stuðulsheimilaðar?

2. Viðmerkingar til ávísar greinar í lógaruppskotinum.

Viðmerking til § 1, stk 2 í lógaruppskotinum: Mælt verður til, at endamálsorðingin fyri undirvísingina á málskúlanum ikki lýsir annaðmálsmáltakararnar sum tey, ið eintáttað mugu taka ímóti ("*at geva næminginum innlit* ...."), meðan føroyska mentanin og samfelagið verða fatað sum einsháttað og óbroytilig. Við grundan um orðaval í lógarteksti ber til at umganga ein essentialistiskan 'vit' og 'tit' hugburð.

Viðmerking til § 7, stk. 2 og 3 í lógaruppskotinum: Mælt verður til, at tey í § 7, stk. 2 nevndu førleikakrøv til lærarar á málskúlanum, og sum landsstýrismaðurin sbrt. stk. 3 kann áseta nærri reglur um í kunngerð, byggja á førleikamennandi eftirútbúgvingina, sum Fróðskaparsetur Føroya longu bjóðar sum diplomútbúgving til undirvísarar í føroyskum sum annaðmál. Viðmerkjast skal tó, at nevnda útbúgving á Fróðskaparsetrinum í so fall má uppraðfestast í mun til skipan, menning av fakøkinum, gransking á økinum, fígging, arbeiðsorku og stuðulsfunktiónir.

Viðmerking til Kap. 7, § 10 um Ráðgevandi nevnd: "Í nevndini sita kommunalu málskúlaleiðararnir og málskúlastjórin, sum er formaður í nevndini". Eingin trygd er fyri, at kommunalir málskúlaleiðarar, ið møguliga eisini eru leiðarar av kommunalu kvøldskúlaskipanini, hava fakligar førleikar, ið eru viðkomandi fyri FSA-økið. Við hesari samanseting av ráðgevandi nevnd er eingin trygd fyri, at tað eru fakligir og námsfrøðiligir førleikar viðkomandi fyri føroyskt sum annaðmál, ið eru í miðdepli. Hetta kann hava avleiðingar fyri dygd í útbúgvingum og skeiðum, fyri tey ið læra føroyskt sum annaðmál, og ikki minst fyri undirvísarar skúlans. Mælt verður tí til, at umboð við viðkomandi fakligum førleika á økinum er partur av ráðgevandi nevndini, ið hevur til uppgávu at ráðgeva málskúlastjóranum. Tað kunnu til dømis vera lærari við útbúgving á masterstigi í føroyskum sum annaðmál og granskari á Setrinum, ið granskar í føroyskum sum annaðmál.

Viðmerking til Kap. 4, § 8: Mælt verður til, at føst fígging verður sett av til gransking og eftirútbúgving av lærarum í uppskotinum til fíggjarkarm. Harumframt, í lýsing av fígging av verandi skipan og fígging av málskúlanum, er lestrarvegleiðing íroknað einum hálvum ársverki til skrivstovuhald, rakstur, lestrarvegleiðing og annað (bl.s. 7 í viðmerkingum til lógaruppskotið). Hetta er alt ov lágt sett, serliga tá uppskotið lýsir undirvísingina á málskúlanum sum landsfevnandi. Við lestrar- og karrieruvegleiðing er talan um týdningarmikla stuðulstænastu, sum í einum lívlong læringssjónarhorni altíð má vera javnbjóðis atkomulig hjá teimum, ið læra føroyskt sum annaðmál (og øllum lesandi).

Samanumtikið um uppskotið til løgtingslóg

Fyri at enda við einari yvirskipaðari viðmerking, so undrar tað okkum á Fróðskaparsetri Føroya, at nýggjur sjálvstøðugur stovnur verður settur á stovn, uttan at ein yvirskipað og strategisk heildarætlan er gjørd fyri føroyskt sum annaðmál. Er málskúlin rætta loysnin fyri FSA-økið? Fakøkið er samansett, komplekst og fjøltáttað, har nógvir tættir skulu virka saman. Hetta krevur íløgur, samstarv og fakliga menning á fleiri mótum við atliti til lívlanga læring. Á øllum stigum í útbúgvingarverkinum er tørvur á átøkum, førleikamenning av lærarum og skúlaleiðarum, samstarvi tvørtur um geirar og at skipa tryggar karmar og umstøður hjá lærarum til at veita øllum næmingum dygdargóða undirvísing.

Á Setrinum er tørvur á, at ferð kemur á gransking í føroyskum sum annaðmál, og at nýggja fakøkið verður ment. Øll útbúgvingarstig og øll lið í 'ketuni' treyta hvørt annað. Tí ber ikki til at seta á stovn nýggjan sjálvstøðugan stovn uttan eisini at raðfesta útbúgving og eftirútbúgving av FSA-undirvísarum, og at kjølfesta sambindingina millum útbúgvingarpolitikk, gransking og praksis á fakøkinum føroyskt sum annaðmál.

Vegna Fróðskaparsetur Føroya

Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri